# Eykajáttan upp á 22,7 milliónir

*Nógv tað mesta er peningur, sum verður fluttur frá í fjør og peningur, sum verður fluttur ímillum ymisk málsøki, so útreiðslurnar hækka sera lítið*

ÁKI BERTHOLDSEN

Leygardagin fer Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, at leggja tað fyrstu eykajáttanarlógina í ár fyri tingið.

Landsstýrismaðurin sigur, at tilsamans hevur hann søkt tingið um eykajáttanir uppá 22,7 milliónir.

Men tað merkir ikki, at ætlanin er at økja útreiðslurnar hjá landskassanum 22,7 milliónir.

Tí av teimum 22,7 milliónunum, eru 20 milliónir, peningur, sum leyp av ymsum játtanum í fjør, og sum sostatt skulu játtast av nýggjum í ár.

Talan er um játtanir til ymisk endamál, sum tað ikki eydnaðist at brúka í fjør av ymsum orsøkum og so fellur hann aftur í landskassan. Sostatt er neyðugt tingið at játta peningin av nýggjum.

Eitt nú er talan um játtanir til ferjulegur hjá Strandferðsluni í sambandi við nýggju Sandoyarferjuna, bygging á Landssjúkrahúsinum og annað, sum tað ikki eydnaðist at brúka , eitt nú, tí at veðrið var so ringt, at tað var ikki arbeiðandi.

Harafturat er talan um játtanir, sum eru fluttur frá einum øki ár, til onnur.

Uppi í eykajáttanarlógini eru eisini einar 900.000 krónur, sum fiskimálastýrið hevur fingið inn í óvæntaðum inntøkum, sum nú verða játtaðar til ymisk endamál.

Talan er um lán, sum vórðu avskrivað, men sum tað kortini eydnaðist at fáa inn.

Karsten Hansen sigur, at sostatt er ikki meiri enn einar tvær milliónir í beinleiðis eykaútreiðslum hjá landskassanum, sum ætlanin nú er at játta til ymisk endamál.

Hetta samsvarar eisini væl við stavnhaldið hjá fíggjarmálaráðaharranum.

Tí hann sigur, at hann hevur alla tíðina lagt stóran dent á, at eykajáttanirnar til tey ymsu málsøkini, skuldu takast frá játtanunum til onnur málsøki, og skuldu tískil ikki føra eyka útreiðslur við sær fyri landskassan.

Hann sigur, at ætlanin er at leggja tríggjar eykajáttanir fram í ár, og hetta er so tann fyrsta av teimum.

Sostatt er ætlanin at sleppa undan, at eykajáttanir verða lagdar fram so oftani, sum eitt nú í fjør.

Hann leggur afturat, at eykajáttanin, sum nú verður løgd fyri tingið, er gjølla viðgjørd í samgonguni og semja er um, hvussu hon skuldi síggja út.

Frá tí, at uppskotið er lagt fram, inntil tað er endaliga samtykt, kann roknast við, at tað gongur ein mánaði, ella so.

## Strandferðslan fær 6 milliónir

Strandferðslan fær nú seks milliónir afturat til raksturin í ár.

Hetta sæst av teirri eykajáttanarlóg, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, fer at leggja fyri tingið leygardagin.

Strandferðslan er eisini ein stovnur, sum hevur fingið drúgva umrøðu í sambandi við fíggjarlógina fyri 2000.

Løgtingið vildi hvørki lata Strandferðsluna sleppa at hækka ferðaseðlaprísirnar, ella at avmarka tænastuna, so endaliga roknstykkið hjá stovninum fyri í ár, sá soleiðis út, at fekk hon ikki sjey milliónir afturat til raksturin, mátti hon heilt einfalt at halda uppat at sigla seinni í ár.

Men sjey milliónir fær hon ikki, tí Karsten Hansen sigur, at ætlanin er at játta henni seks milliónir afturat á eykajáttanarlógini. Hann sigur, at metingarnar siga, at tað eigur stovnurin at klára seg við, tí árið er ungt enn til at gera broytingar og tillagingar

*–Áki–*



*Karsten Hansen heldur, at Strandferðslan eigur at klára seg við seks milliónum afturat í ár*



# Ein millión eyka til lønir á Suðuroyar Sjúkrahúsi

*Umleið 700.000 krónur skulu flytast frá sjálvum rakstrinum til lønir, men harafturat fær sjúkrahúsið eina heilt nýggja játtan upp á umleið 300.000 krónur*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú tykist tað verða greitt, at Suðuroyar Sjúkrahús sleppur undan at seta heilt so stórar sparingar í verk, sum alt annars bendi á, tá ið fíggjarlógin fyri 2000 varð samtykt beint fyri nýggjár.

Sostatt tykist tað heldur ikki, sum um heilt so nógv fólk fara at verða uppsøgd, sum vandi annars leingi hevur verið fyri hesar seinastu mánaðirnar.

Hetta skilst á lagnum, nú Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur borið eina umsókn um eykajáttan niðan í tingið.

Sum skrivað í greinini niðanfyri, verður uppskotið lagt fram leygardagin.

**Ein millión afturat**

Suðuroyar Sjúkrahús er ein stovnur, sum hevur verið nógv umrøddur í sambandi við fíggjarlógina í ár.

Hetta, tí at sjúkrahúsið hevur gjørt vart við, at játtanin er 1,5 millión ov lítil til at kunna varðveita virksemið á sama støði í ár, sum í fjør.

Higartil eru 4,5 søgd úr starvi á Suðuroyar sjúkrahúsi, eitt hálvt í køkini, eitt í vekslaranum/leiðbeininginі, eitt á teknisku deild og tveir fysioterapeutar.

Hetta verður mett sum ein lítil vanlukka á Suðuroyar Sjúkrahúsi, tí tað ber í sær, at tann ambulanta fysioterapiin verður niðurløgd og tað er til stóran ampa hjá einum hópi av sjúklingum.

Somuleiðis ber tað tí sær, at tað ber ikki til at ganga vakt á teknisku deild og sostatt er ongin at gera tól aftur, sum verða í óstandi uttanfyi vanliga arbeiðstíð.

Tær uppsagnirnar, sum eru settar í verk, eru ein sparing uppá 680.000 krónur.

**Beinleiðis eykajáttan**

Sostatt eru sparingar fyri 820.000 krónur eftir at fremja, men landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum bað leiðsluna á Suðuroyar Sjúkrahúsi bíða við fleiri uppsagnum inntil eykajáttanarlógin, sum nú verður løgd fram, er samtykt.

Og nú tykist tað sum um tað ikki verður neyðugt hjá Suðuroyar Sjúkrahús at spara heilt so nógv, sum vandi upprunaliga var fyri.

Men tað tykist líka greitt, at sjúkrahúsið fær ikki allan peningin, sum er neyðugur fyri heilt at sleppa undan uppsagnum.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at í eykajáttarlógini, sum nú verður lagt fyri tingið, verður søkt um at játta Suðuroyar Sjúkrahúsi eina millión afturat til lønir.

Men av teimum skulu einar 700.000 krónur flytast frá øðrum rakstri hjá sjúkrahúsinum yvir til lønarkarmin.

Harafturat fær sjúkrahúsið eina beinleiðis eykajáttan uppá 300.000 krónur.

Av teimum eru 200.000 krónur tiknar av øðrum økjum hjá almanna og heilsumálastýrinum. Sostatt eru tær seinastu 100.000 krónurnar ein beinleiðis eyka útreiðsla hjá landskassanum.

Men tað merkir so aftur, at tað eru framvegis 500.000 krónur eftir, sum sjúkrahúsið skal spara í ár, sum landið liggur í løtuni.



# HYGG & HOYR

Fríggjadagur 3. mars

# Útvarpið gerst nú digitalt

*Seinastu vikuna er studio fimm í Útvarpinum umbygt, og er so at siga øll útgerðin nú digital. Hetta er liður í tøkniligu menningini hjá Útvarpinum*

JÁKUP MØRK

Digitala kollveltingin hevur nú herja bæði her heima og úti í heimi í nøkur ár, og hetta hevur so havt við sær, at virkir og stovnar hava verið noydd at fremja alskyns íløgur, til tess at kunna fylgja við tíðini.

**Lættir um arbeiðið**

Í Útvarpinum hava tey eisini ásanna, at neyðugt er við moderniseringum á økinum, og tískil eru eisini teir farnir undir at skifta útgerðina, sum ymsu studioini hava.

Fyrsta studio, sum hevur fingið eina yvirháling, er væl kenda studio fimm, haðani so at siga allar tær beinleiðis sendingarnar verða varpaðar út.

Seinastu vikuna hevur verið arbeitt av fullum alvi, fyri at skifta alla útgerðina í rúminum út, og nú arbeiðið er liðugt, hevur útvarpið eitt av mest framkomnu studionum í danska kongaríkinum.

Hans Andor Johannesen greiðir frá, at hetta er fyrsti pulturin av sínum slag í danska ríkinum, og einans hin næsti í norðanlondum.

Fyrimunirnir við slíkum pultum eru nógvir, men fyrst og fremst merkir hetta, at arbeiði hjá tøkningunum gerst munandi lættari.

**Fáir knøttar**

Tey, sum hava sæð ein av vanligu pultunum, hava helst bitið merki í, hvussu nógvir ymsir knøttar eru, sum tøkningarnir skulu halda skil.

Á nýggja pultinum eru hesir knøttar so at siga horvnir, men er tað ístaðin ein telda, sum stýrir hesum. Sjálvsagt skal teldan hava eina rúgvu av upplýsingum, um hon skal rigga á nøktandi hátt, men eftir at hon hevur fingið hesar upplýsingar eina ferð, ber til at goyma allar innstillingar, soleiðis at tær kunnu heintast fram aftur eftir lítlari løtu.

Hetta er sjálvsagt ein stórur fyrimunur, tí á henda hátt kunnu tøkningarnir uttan stórvegis hóvastták sessast við pultin, og stilla alt inn, júst soleiðis sum teir vilja hava tað.

Tá vit í gjár tosaðu við Hans Andor, vóru teir í ferð við at royna sendiútgerðina, og eftir ætlan skuldi nýggja studio fimm takast í nýtslu í gjárkvøldið.

Heilt uttan afturhvarv er nýggja studio ikki, tí hóast meginparturin av útgerðini nú er digitaliserað, so eru framvegis bandupptakarar og plátuspælarar at síggja í studionum, tí enn eigur Útvarpið nakað nógv av bondum og vinyli.



# ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

# Fupp ella fakta



**Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, skrivar**

Við tvinnum útvarpsrásum afturat er nógv broytt seinastu tíðina fyri tey, sum hava hug og stundir at lurta, og við hesum býðst so sanniliga nakað fyri ein og hvønn smakk, ikki vist at øllum dámar alt á øllum trimum rásum, og kanska serliga framburðarháttin, formin, men tað ber so til at lurta seg fram, lesa skráir, velja og vraka.

Og tað havi eg so roynt, so vítt stundir hava verið til tess.

Hjá Lindini lurti eg javnan eftir gestum í sjómanssendingini Vitanum, og seinni á kvøldi eftir gestum hjá Jenisi, men oftast bert tí at talan ehvur verið um forvitnisligar gestir, og sum so heppið val av slíkum.

Í aðrar mátar tykist mær sendingarnar vera í so leyst skipaðar og tíðum fjasutar, fyri ikki at siga popputar.

Bønartænastuni havi eg lurtað nakað eftir, tó mest av forvitni, og í longdini havi eg ikki unnast við formin at varpa sovorðið út um geilarhornini, har forholdini hjá okkum eru so smá.

Eg ivist ikki í, at forbøn fer fram í mongum øðrum førum tað veri seg í »lønkamarinum« eins og trúgvi, at Várharra hoyrir og sær líka væl í loyndum, tí tað hevur hann sjálvur sagt og boðið.

Men í øllum førum kann ein ikki vera annað enn djúpt imponeraður av tí dirvi og orku, sum hasi fólkini í Lindini leggja í sítt sjálvbodna útvarp- og boðanararbeiði, eins og tað ikki er at ivast í, at rásin hevur sín trúgva lurtaraskara, hann veri seg lítil ella stórur.

Meðan Lindin higartil hevur megnað reiðiliga væl at fylgt skránni, so kann tað sama ikki júst sigast um RÁS 2, har tað herfyri straks kendist, at programleiðarin sjálvur annar eitt skifti var farin av landinum.

Summar fastar sendingar, eitt nú »Flenn bara«, versnaðu týðuliga, og onkur var hóast frammanundan lýst als ikki framleidd.

Hatta er vandin við fámentum starvsliðið og man fara at javna seg við tíðini, og Rásin fær tryggari grundfesti við m.a. víðari sendiøki, lurtaraskara og inntøkugrundarlagi.

Og programstjórin & Co. hava so avgjørt ikki ligið á løtu síðu niðri, síðani tey høvdu fleiri áhugaverd innsløg við sær heim aftur at senda í Rás 2.

Annars er fasta fríggjadagssendingin »Skipini nær og fjar« framvegis frálík, og tá eg ikki stúri fyri tí sendingini frameftir, er tað tí skilagóða vertinum fyri at takka, umframt at keldutilfarið skuldi verið ótømandi, so fjølbroytt og áhugaverd føroyska høvuðsvinnan nú einaferð er.

ÚF og SvF royna í sínum lagi at hanga í við góðum afturvendandi sendingum, umframt at bróta eitt sindur upp úr nýggjum.

Í so máta dansaðu og skemtaðu tey alt leygarkvøldið í ÚF, og í »Degi og Viku« týskvøldið setti SvF sjøtul á eitt komandi fast, føroyskt týskvøldsevni, hesa ferð um menningarumstøður hjá brekaðum børnum í Føroyum.

At enda má eg enn eina ferð taka fram frálíku evni Zacharias Hammers at finna uppá og til lítar útinna føroyskar sendingar, sum annars skuldu verið upplagdar.

Hesu ferð var hann á garnaveiðu eftir svartkalva við »Thor«, og lýsti hann væl og ósentimentalt ta vinnuna, skipslívið umborð og heimaavkastið við.

Tað kom ikki beinleiðis fram í sendingini, at vit her høvdu eitt frálíkt dømi um, at tað kortini við uppfinnsemi og áræði ber til at skapa vinnuveg og brúkiligt livibreyð burtur úr annars lítisverdum.

Tað eru ikki so mong ár síðani hatta gamla, men frálíka skip saman við øðrum mest sum varð tveitt burtur í onkrum falittkróki við føroyskt havnalag, inntil evnaríkir ungir menn av bygd keyptu tað fyri lítið og lætt, og við tí fóru at troyta nýggjar møguleika rí føroyskum heimasjógvi.

Og meðan føroysk fiskivinna alsamt stúrir fyri sera kostnaðarmiklari endurnýggjan fyri framman, hava vit her eitt dømi um, at tað við áræði og uppfinnsemi kortini bert il at endurnýta eitt annars gamalt og avlagt vinnuamboð til tess at útvega kostnaðarlítlar vinnumøguleikar fyir bæði manning og fólk á landi, íroknað hasar kviku kvinnuhendurnar á garnavirkinum á Oyri.

Í so máta veitti farna fjølmiðlavika mær mest fakta.

ÚTsjón Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN